Vágs POP

**Bartal Læarsson, 16 ár**



*Hvat dámdi tær konsertina?*

– Mær dámdi hana væl, hon var mega feit. Hon var... hon var... ja, eg haldi faktiskt ikki, at man kann siga tað við orðum Tað vóru ræðuliga nógvar kenslur í tónleikinum, og tað var stuttligt at hoyra. Eg haldi eisini, at tað er feitt, at teir hava tvey trummusett, tríggjar guittarar og tveir sangarar. Og so var síðsta lagið eitt fantastiskt klimaks á konsertini.

*Hvussu heldur tú, at hølini í Vágsbotni egna seg til slíkar konsertir?*

– Eg haldi, at hølini eru sera væl egnað. Tey eru hugnalig, men skal eg nevna eitt minus, so eru kanska ikki so nógv pláss til áhoyrararnar.

**Margreta á Rógvu, 21 ár**



*Hvat dámdi tær konsertina?*

– Eg helt, at hon var fínasta slag. Tað er gott, at onkur ger okkurt øðrvísi við hvørt. Eg haldi, at tað ger tað ógvuliga áhugavert, at teir hava 2 trummuspælarar. Hetta var ein skeg konsert.

*Hvussu heldur tú, at hølini í Vágsbotni egna seg til slíkar konsertir?*

– Tey egna seg væl, heilt sikkurt. Hetta var ordiliga gott og tað riggaði væl í hesum hølunum. Eg haldi, at jú fleiri slík spælistøð eru, jú betri.

**Hildibjarta Simonsen, 15 ár**

**Joan Simonsen, 18 ár**



*Hvat dámdi tykkum konsertina?*

– Okkum dámdi væl, sjálvt um hetta ikki er tónleikur vit lurta eftir dagliga. Men hetta var skeg. Serliga tann seinasti sangurin, sum var eitt sindur jungle-kendur, við speciellum ljóðum og indianararútmum. Hann var ordiliga góður og serligur.

*Hvussu halda tit, at hølini í Vágsbotni egna seg til slíkar konsertir?*

– Tey eru væl egnað. Her er gott pláss og hugnaligt.

**Henning Nicodemussen, 30 ár**



*Hvat dámdi tær konsertina?*

– Í dag er jú flaggdagur, og hon var kanska ikki so flaggdags'slig. Men eg haldi avgjørt, at hetta var eitt gott mentanartiltak. Og eg haldi, at hetta var ein sera góð næmingakonsert. Rættiliga skeg. Tað burdi verið meiri av hasum.

*Hvussu heldur tú, at hølini í Vágsbotni egna seg til slíkar konsertir?*

– Eg haldi, at tað var fínasta slag. Eisini ljóðmessiga, tá man hugsar um hvussu nógv »larmi-instrument« teir nýttu, t.d. trummur og gittarar, so haldi eg, at ljóðið var sera gott.

# Úr Vágsbotni á

**Fyrsta konsertin, sum nakrantíð varð hildin í miðlahúsinum í Vágsbotni gav eitt ítøkiligt úrslit. Bólkurin »Fólkayvirlitið« hevði ikki meiri enn takkað fyri seg, tá teir fingu eina innbjóðing til ein norskan festival í summar**

MIÐLAHÚSIÐ

*Orð:Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*
*myndir: Bárður Lydersen, Jan Müller*

– Beint eftir konsertina, varð eg togaður til síðis av tveimum umboðum fyri norska Storås festivalin, sum bjóðaðu okkum at luttaka í summar. So man kann siga, at tað gav úrslit beinanvegin at spæla í miðlahúsinum í Vágsbotni, greiðir ein ikki sørt errin Karl Anthon Klein frá, eftir konsertina.

Storås festivalurin bjóðaði á stóra tónleika tiltakinum, AME, bólkinum Makrel at luttaka, og nú er sostatt eisini eitt annað føroyskt orkestur bjóðað við.

– Vit ætla okkum sjálvsagt til Norra á festival, um vit á nakran hátt fáa farið. Men tað kemur kanska í krambolagu við ein íslandstúr, sum vit í løtunin planleggja, greiðir Karl Anthon frá.

Men hann fegnast um møguleikan, sum miðlahúsið í Vágsbotni nú hevur verið lopfjøl til.

– Ætlanin, við at koma at spæla her niðri, hevur allatíðina verið, at fokus nú skuldi verða sett á tónleikararnar og á tónleikin, sum heild. Og tað haldi eg eydnaðist bara heilt væl, sigur hann.

### Góð konsert

Headmaðurin aftanfyri »Fólkayvirlit«, Karl Anthon Klein, er sera væl nøgdur við konsertina sum heild.

– Fólk vóru við, og tey vóru ógvuliga entusiastisk. Dreingirnir spældu sera væl og kláraðu seg fínt. Teir eru nevniliga góðir tónleikarar allir samlir, staðfestir Karl Anthon Klein.

Hann sigur víðari, at nógv fólk kom inn av gøtuni at forvitnast, og tað var gott.

– Seinasta lagið hjá okkum var kanska nakað larmut fyri summi, men eg haldi, at fólki sum heild eisini dámdi konsertina, sigur Karl Anthon Klein at enda.




Miðlahúsið presenterar:

# Fólkayvirlitið

**8 tónleikarar manna Fólkayvirlitið:**

**Karl Anton Klein:** sang, guitar og keyboards.
**Dagbjartur Meyer:** sang og percusion.
**Johannes Johannessen:** guitar og sang.
**Frans A. Galán:** guitar, sang og percusion.
**Andreas Pauli Poulsen:** bass.
**Andreas Dalsgaard:** trummur.
**William S Olsen:** percusion og trummur.
**Bjartur Fríði Clementsen:** keyboards

*Hvaðani kemur navnið» Fólkayvirlitið«?*

– Jamen vit liva í einum eftirlitssamfelag, har øll hava eftirlit og yvirlit við øllum, og øll fólk eru innskrivað í fleiri yvirilit av ymiskum slag. Men vit eru nú yvirlitið yvir øllum yvirlitum. Og vit góðtaka eisini samkynd.

*Hvussu nógvir tónleikarar eru tit?*

– Vit spæla ikki bara tónleik, vit eru eitt sirkus. Vit eru 8 sum spæla og so hava vit eisini 2 bodyguardir og 2 sleiparar. Vit mugu hava fólk, sum hjálpa okkum og verja okkum, tí tað er sera kalt á toppinum í føroyska tónleikaheiminum.

*Tit eru eitt framhald av bólkinum einkikanndiskuterast.altkann. Hví hildu tit ikki bara fram í tí bólkinum?*

– Tí hitt var for katagoriskt. Tað nyttar ikki at eita einkikanndiskuterast, tá alt allíkavæl verður diskuterað allatíðina. Vit eru næstan sama manning, men hava fingið 3 nýggjar at hjálpa okkum.

*Hvønn tónleik spæla tit so?*

– Vit spæla góðan tónleik. Bara góðan tónleik. Tekstirnir snúgva seg um sex, gud og samfelagið. Fyrr sungu vit bara um gud og samfelagið, men nú fyllir sex eisini nokkso nógv. Vit syngja á føroyskum og enskum. Viðhvørt mest á føroyskum og viðhvørt mest á enskum. Tað er fyri tað mesta Karl Anton Klein sum skrivar tekstirnar.

*Hvussu ofta venja tit?*

– Av tí, at vit eru so nógvir, er tað ringt at finna venjingartíðir, tá allir kunnu. Allir limirnir spæla eisini í fleiri bólkum, tí hetta eru teir absolut bestu tónleikararnir í býnum, Hetta er kremið av kreminum. Men vit royna at samskipa tað soleiðis, at vit eisini fáa vant saman viðvørt.

*Hvussu kennist tað so at fáa tann ótrúliga heiður at vera fyrsti bólkur, ið spælir í Miðlahúsinum í Vágsbotni?*

– Tað er stórt. Og eitt alvorligt herðaklapp. Vit eru ræðuliga glaðir fyri tann heiðurin. Og eisini tí vit koma í søguna, sum fyrsti bólkurin í Vágsbotni. Vit vóna veruliga, at hetta verður eitt veruligt tónleikastað, har sum nógvir bólkar kunnu koma at framføra framyvir.

*Er tað tørvur á spælistøðum í Havnini?*

– Nei, ikki í Havn. Vit hava jú Margarinfabrikkina, har vit altíð kunnu framføra. Annars eru nógvir kjallarar runt umkring í Havnini, har tað eisini saktans ber til at framføra. Hvis man veruliga vil spæla, so finnur man eisini altíð eitt stað.

*Men tíma fólk at koma á tílíkar konsertir?*

– Tað er rættiliga ymiskt. Summi tíma og summi tíma ikki. Men vit leggja ikki so nógv í, um tað ikki eru so nógv fólk. Ein nýggj amerikansk kanning hevur nevniliga víst, at um tað eru for nógv fólk til konsertir, so tekur tað spæligleðina frá tónleikarunum, so vit eru faktist glaðir fyri, at tað ikki eru so nógv fólk altíð.